# FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-148_3.1
dags. 15-09-2011

**Vinumálaráðið**

Teldupostur: sami

***Viðv.: Uppskoti til kunngerð um drekkivatn, tygara 10/00496-7***

Føroya Kommunufelag hevur tann 11. juli, móttikið uppskot til kunngerð um drekkivatn. Stýri felagsins hevur seinast viðgjørt uppskotið tann 13. septembur, og metur, at uppskotið hevur alvorligar avleiðingar fyri kommunurnar.

## Alment

Við kunngerðaruppskotim verða krøvini til vatngóðsku munandi harðari en eitt nú galdandi krøv viðvíkjandi fiskaútflutning. Her er talan um ES krøv meðani kunngerðaruppskotið tykist vera eins og norska drikkevannsforskriften.

Serliga vil stýrið taka fram, at neyðugt er at

- fáa greiðu á, hvat løgfrøðiliga viðvíkjandi møguligum endurgjaldskravi liggur í, at vatnverkini skulu tryggja vatngóðskuna.
- fáa greiðu á hvat liggur í, at vatnverkini skulu hava eina tilbúgvingarætlan.
- longja freistina fyri løggilding av vatnverkunum.
- minka um títtleikan av sýnistøkum.
- hyggja at góðskukrøvunum í mun til vatnsdygdina vit hava her í landinum.

## Viðmerkingar til einstakar kapitlar

*Ábyrgd av drekkivatni og av innaneftirliti*
At vatnveitarin skal tryggja, at drekkivatnið lýkur krøvini til góðsku, nøgd og veitingartrygd, má setast í mun til reellu møguleikarnar hjá veitaranum at ávirka støðuna.

Til samanberingar verður víst til norsku drikkevannsforskriften, har tað stendur, at:"vannverkseier skal påse at drikkevannet tilfredstiller kravene.... og í ES direktivinum 98/83/EF frá 03.11.98 stendur í Artikel 4: medlemsstaterne træffer .... de nødvendige fornastaltninger for at sikre, at drikkevandet er sundt og rent."

Tað má tryggjast, at vatnveitarin ikki kann fáa endurgjaldskrav frá eitt nú útflytara, um t.d. fiskur er seldur av landinum, sum inniheldur koliformar bakteriur. Slík ábyrgd kann bert gerast galdandi vegna grovt ósketni og vanrøkt hjá kommununi.

Mælt veður til, at greina hesi viðurskifti løgfrøðiliga.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

Um innaneftirlit kann hugsast, at kommunurnar í felag gera uppskot til innaneftirlitsskipan, sum so kann tillagast tí einstøku vatnveitingarskipanini, men eingin ivi er um, at talan er um kostnaðarmikið tiltak.

*Løggildingarkrøv og treytir*
Vit hava í tveim førum sett okkum í samband við Starvsstovuna, og eftirlýst fleiri upplýsingar um løggildingina, eitt nú eitt umsóknarskjal um løggliding, men hava einki frætt aftur.

Vit seta eisini spurning til, um hvussu víttfevnandi veitingarskyldan skal røkka. Um turkur er í longri tíð, kann tað henda, at einki vatn er at veita, og kann tað hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa, um hon skal keypa vatn.

Eisini viðvíkjandi tilbúgvingarætlanum, er spurningur um hon faktiskt er vatnveitingarskylda ella fyribyrgjandi, undir óvanligum umstøðum.

*Góðskukrøv*
Sum heild, setur uppskotið strangari krøv til drekkivatn en ES. Hin vegin vísa mátingar, at eingir trupulleikar eru av teimum ymisku kemisku evnunum í vatninum her. Spurningurin er tí, hví seta krøv, sum ES ikki setur. Hetta fer bert at økja um kostnaðin.

Største trupulleikin er turbiditetur og litur. Hesi virði fara í Føroyum viðhvørt upp um markvirðini. Turbiditeturin minkar við at filtrera vatnið gjøgnum sandfiltur, men tá áarføri er, er eisini trupult at halda turbiditetin undir markinum. Litin fæst einki gjørt við, uttan sera stórar íløgur í flokkuleringsútgerð og eyka rakstrarkostnað. Tá ES eingi krøv stillar um eitt beinleiðis markvirði[1], so átti tað ikki vera neyðugt at gera tað í her, og soleiðis økja um kostnaðin. Sí meira um hetta í *fylgiskjali 1.*

Um týttleikin av sýnistøkum, sum skotin er upp verður samanlíknaður við ES krøv, er eyðsæð, at talan er um langt fleiri sýnistøk:

| Føroyska kunngerðin (og Norra) | | | | | ES | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkatal | Neteftirlit (sýnistøku umfør) | Einfalt rutinueftirlit | Víðkað rutinueftirlit | Rávatn | Vatnnøgd pr. dag m³ | Løbende kontrol | Efterprøvningskontrol |
| 51-500 | 12 | 4 | 1 | 4 | < 100 | - | - |
| 501-1000 | 12 | 4 | 1 | 4 | 100-1000 | 4 | 1 |
| 1001-5000 | 24 | 4 | 1 | 4 | 1000-10.000 | 4 + 3 pr 1000 m³ | 1 + 1 pr. 3300 m³ |
| >5001 | 48 | 4 | 1 | 4 (>10.000 fólk 8) | 10.000-100.000 | | 3 + 1 pr. 10.000 m³ |

Í hesum sambandi verður hugt at mettum kostnaði fyri eftirlitið:

[1] ES hevur tað við í loypandi kanningum fyri at tryggja, at tað ikki eru ónormalar broytingar..

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

| | Kostnaður uttan MVG |
|---|---|
| Neteftirlit. Út frá prísunum í dag, sum liggja í millum 1393 og 1651 er kostnaðurin mettur eitt sindur hægri, ti onkur kanning kemur afturat (ammonium) | 1.600 kr. pr. sýni |
| Víðkað rutinueftirlit (svarar nøkunlunda til Normal kontrol (stor) hjá eurofins. | 1.800 kr. pr. sýni |
| Rávatn | 1.600 kr. pr. sýni |
| Løggilding | 1.000 kr. um árið |

*Gildiskoma og skiftisreglur*
Freistin sum uppskotið skýtur upp, 1 ár til at lata Starvsstovuni umsókn um løggilding, er órealistisk. Krøv til útbúnaðin er ikki útgreinaður. Arbeiðið kann bliva so umfatandi og kostnaðarmikið, at tað ikki kann lata seg gera at halda freistina.

Kommunurnar hava úr at gera við at fáa spillivatnsskipanina liðuga innan 2015, og hetta kostnaðarmikla arbeiði merkir kommunukassarnar.

Við hesum viðmerkingum heitir stýri Føroya Kommunufelags á Vinnumálaráðið og Heilsufrøðisligu starvsstovuna um at taka kunngerðaruppskotið til endurskoðan.

fyri felagið

Sveiney Sverrisdóttir, skr.

*Fylgiskjal 1*

Viðmerking til talvurnar: har okkara markviðir eru litaði reyð, eru okkara markvirðir og treytir strangari en í ES.

Talva 1, sansabærir parametrar:

| | | Markvirðið FO/NO | Tiltøk | Markvirðið EU | | Mátingar í Føroyum |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Litur | 20 | B | Acceptabel for forbrugerne Bilag I C | | |
| 2 | Luktur | 2 við 12°C<br>3 við 25°C | C | Acceptabel for forbrugerne Bilag I C | | |
| 3 | Smakkur | 2 við 12°C<br>3 við 25°C | C | Acceptabel for forbrugerne Bilag I C | | |
| 4 | Turbiditetur | 1 | B | Acceptabel for forbrugerne Bilag I C | Bestræbe sig for under 1 | |

Talva 2 mikrobiologiskir parametrar:

| | | Markvirðið FO/NO | Tiltøk | Markvirðið EU | | Mátingar í Føroyum |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5 | Cl. perfringens | 0 | C | 0 Bilag I C | | |
| 6 | E. coli | 0 | A | 0 Bilag I A | | |
| 7 | Intestinalir enterokokkar | 0 | A | 0 Bilag I A | | |
| 8 | Kimtal 20 | >100 orsøk kannast | C | Ingen unormale ændringer Bilag I C | | |
| 9 | Koliformar bakteirur | 0 | B | 0 Bilag I C | | |

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

Talva 3 kemiskir og fysiskir parametrar:

| | | Markvirðið FO/NO | Tiltøk | Markvirðið EU | | Mátingar í Føroyum Heilsufrøðiliga Starvsstovan 98-99 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 17 | 1,2-dikloretan | 3 | B | 3 Bilag I B | | |
| 18 | Aluminium | 0,2 | C | 0,2 Bilag I C | | <0,1 |
| 19 | Ammonium | 0,5 | C | 0,5 Bilag I C | | ikki mátast |
| 20 | Antimon | 5 | B | 5 Bilag I B | | max 1,6 |
| 21 | Arsen | 10 | B | 10 Bilag I B | | max 0,13 |
| 22 | Benzen | 1 | B | 1 Bilag I B | | |
| 23 | Benzopyren | 0,010 | B | 0,01 Bilag I B | | |
| 24 | Blýggj | 10 | B | 10 Bilag I B | | max 1,1 |
| 25 | Bor | 1 | B | 1 Bilag I B | | |
| 26 | Bromat | 5 | B | 10 Bilag I B | | |
| 27 | Cyanid | 10 | B | 50 Bilag I B | | ikki mátast |
| 28 | Fluorid | 1,5 | B | 1,5 Bilag I B | | |
| 29 | Glykolir | 10 | B | | | |
| 30 | Hydrokarbonir, mineraloljur | 10 | B | | | |
| 31 | Jarn | 0,2 | C | 0,2 Bilag I C | | mest frá jarnrørum, sum í dag verða plastikk |
| 32 | Kadmium | 5 | B | 5 Bilag I B | | max 0,01 |
| 33 | COD | 5 | C | 5 Bilag I C | | 0 - 6 |
| 34 | Klorid | 200 | C | 250 Bilag I C | | 10-50 |
| 35 | Konduktivitetur | 250 | C | 250 Bilag I C | | 10-20 |
| 36 | Kopar | 0,1 | B | 2 (frá krana) Bilag I B | | |
| 37 | Krom | 50 | B | 50 Bilag I B | | max 1,1 |
| 38 | Kyksilvur | 0,5 | B | 1 Bilag I B | | max 0,005 |
| 39 | Mangan | 0,05 | C | 0,05 Bilag I C | | < 20 |
| 40 | Natrium | 200 | C | 200 Bilag I C | | 10 - 20 |
| 41 | Nikkil | 20 | B | 20 Bilag I B | | max 0,93 |
| 42 | Nitrat | 10 | B | 50 Bilag I B | | max 0,17 |
| 43 | Nitritt | 0,05 | B | 0,5 (0,1) Bilag I B | | ikki mátast |
| 44 | pH | 6,5 – 9,5 | C | 6,5 – 9,5 Bilag I C | | innanfyri markvirðið |
| 45 | Pestisidir | 0,1 | B | 0,1 Bilag I B | | ikki mátast |
| 46 | Pestisidir totalt | 0,5 | B | 0,5 Bilag I B | | ikki mátast |
| 47 | PAH | 0,1 | B | 0,1 Bilag I B | | ikki mátast |
| 48 | Radon | 100 | C | | | |
| 49 | Selen | 10 | B | 10 Bilag I B | | max 0,8 |
| 50 | Sulfat | 100 | C | 250 Bilag I C | | 2,5 – 7,3 |
| 51 | Tetrakloreten og trikloreten | 10 | B | 10 Bilag I B | | |
| 52 | Total indikativ dosa | 0,1 | C | 0,1 Bilag I C | | |
| 53 | TOC | 5 | C | Ikke måles for under 10.000 m³/dag Bilag I C | | |
| 54 | Trihalometanir | 50 | B | 100 Bilag I B | | |
| 55 | Tritium | 100 | C | 100 Bilag I C | | |

Nr. 52 og 55 (radioaktivitetur) er ikki neyðugt at kanna í ES, um eitt limaland á annan hátt kann vísa, at innihaldið liggur væl undir markvirðinum.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo